# Krøvini skulu ikki slakast

**Føroya Arbeiðarafelag heitir staðiliga á Landsstýrið um ikki at slaka krøvini fyri at útlendsk arbeiðsmegi kann koma til Føroya**

ÚTLENDINGAR Í FØROYUM

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað skal ikki verða lættari hja útlendskari arbeiðsmegi at koma til Føroya at arbeiða.

Tað heldur Føroya Arbeiðarafelag.

Á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið, samtykti fundurin einmælt eina yvirlýsing, har heitt verður á landsstýrið um ikki at linka treytirnar fyri at útlendingar koma til Føroya at arbeiða.

Aðalfundurin hjá Føroya Arbeiðarafelag staðfestir, at arbeiðsloysið í Føroyum støðugt økist.

Felagið sigur, at hendan óhepna gongd hevur fingið fíggjarligar avleiðingar fyri alsamt fleiri húski, og útlit eru fyri at fleiri løntakarar fara at missa arbeiði sítt.

– Aðalfundurin hevur virðing fyri teimum útlendingum, sum eru komnir til Føroya at arbeiða, og metir tað sum eina sjálvfylgja, at hesum fólkum verður veitt livilig kor.

– Hinvegin mugu vit ásanna, at tað hvørki er til gagns fyri føroysku løntakarafjøldina, ella útlendingar sum søkja um at koma til landið, at Landsstýrið í slíkum tíðum slakar upp á krøvini fyri at fáa innferðar- og arbeiðsloyvi í Føroyum.

– Aðalfundurin mælir tí staðiliga landsstýr-inum og politisku flokkunum á Tingi til at bera so í bandi, at ikki verður slakað upp á krøvini til at fáa innferðar- og arbeiðsloyvi í Føroyum, sigur

Føroya Arbeiðarafelag minnir samstundis á, at tað eru landsmyndugleikarnir sum hava ábyrgdina av at skapa karmar sum skulu tryggja, at arbeiði er til allar føroyingar, og hesa ábyrgd vónar felagið, at Løgtingið og Landsstýrið liva upp til.



*Eftir aðalfundin í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið, er nevndin mannað soleiðis. Frá vinstru: Karla Einarsson, Rituvík, Margretha Rasmussen Fuglafjørður, Sunrid Vang, Froðba,*
*Agnar Olsen er nýggjur í nevndini. Hann er valdur fyri Marius Clementsen, sum tók seg ýur nevndini fyri aldur, Poul Juul Festirstein, Eiði, Georg Hanse, Miðvágur, Agnar Olsen, Hósvík og Ingeborg Vinther, forkvinna*



*Føroya Arbeiðarafelag góðtekur ikki, at útlendsk ítróttarfólk, ella aðrir útlendingar, koma til Føroya at taka arbeiði frá føroyingum*

# Kortanei til at útlendsk ítróttarfólk sleppa at taka arbeiði frá føroyingum

**Føroya Arbeiðarafelag krevur, at helvtin av teimum ítróttarfólkum, sum koma til landið, skulu hava alment arbeiði, so at tað ikki bara skal raka tey tímaløntu verkafólkini**

ÚTLENDSK ÍTRÓTTARFÓLK

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Útlendingar, sum koma hendavegin í sambandi við ítrótt ella í øðrum sambandi, mugu ikki sleppa at at taka arbeiði frá føroyingum.

Tað eru tey samd um í Føroya Arbeiðarafelag.

Á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið, var nógv tosað um teir útlendingarnir, sum koma koma til landið, eisini teir, sum koma higar í sambandi við ítrótt.

Andreas Berglíð úr Sørvági, reisti málið og hann skeyt upp, at Føroya Arbeiðarafelag sendi landsstýrinum skriv. Og í tí skrivinum skal verða kravt, at helvtin av teimum útlendingum, sum koma higar í sambandi við ítrótt, og sum eisini skulu hava arbeiði, skulu hava eitt alment arbeiði.

– Í løtuni eru tað at kalla bara á fiskavirkjunum, at hesir útlendingarnir eru og tað líkist ongum, at tað bara skulu vera føroysk flakafólk, sum missa arbeiðið, tí at útlendskt ítróttarfólk skulu hava teirra pláss.

– Tað líkist ongum, at tað bara skulu vera flakafólk, sum skulu merkja sviðan, tá í útlendingar koma higar at spæla bólt og skulu hava arbeiði afturat. Tey, sum eru alment lønt, skulu eisini merkja, hvussu tað følist, segði Andreas Berglíð.

Á aðalfundinum varð samtykt, at Føroya Arbeiðarafelag skuldi senda landsstýrinum skriv við hesum krøvunum.

## Fáa onki at vita

Óli Johannesen úr Fuglafirði skeyt upp, at Føroya Arbeiðarafelag skuldi virka fyri, at fakfeløgini eisini skuldi fáa eitt tvítak av arbeiðsloyvunum hjá hesum útlendingunum.

– Sum er, fáa feløgini bara boð um, at viðkomandi er blivin limur í felagnum. Men um hann ella hon, hava arbeiðsloyvi, sæst ikki.

Hetta fer Føroya Arbeiðarafelag nú at arbeiða fyri.

Osmund Berg úr Skopun vísti á, at fyrr fingu fakfeløgini ein lista yvir teir limir, sum vóru arbeiðsleysir. Men eisini tað er steðgað. Sostatt er ómøguligt hjá fakfeløgunum at fylgja við, hvørjir limir eru arbeiðsleysir og tí ber til at fáa útlendingar inn ímillum.

Ingeborg Vinther, sum tað er ein gomul samtykt í ALS, at tað eru bara arbeiðsgevarar, sum hava brúk fyri arbeiðsfólki, sum kunnu fáa listarnar yvir arbeiðsleys.

– Arbeiðsgevari, sum biðjur um ein lista við arbeiðstøkum, tí brúk er fyri arbeiðsfólki, skal boða ALS frá, hvat slag av arbeiði, talan er um og hann skal vátta skrivliga, at listin skal forkomast aftaná.

Hon helt kortini, at umboðini fyri fakfeløgini í ALS áttu at roynt at fingið hetta broytt, so at tað var lættari hjá fakfeløgunum at røkja síni áhugamál.

## Gav baksláttur

Ingeborg Vinther segði annars, at Føroya Arbeiðarafelag hevði fund við undanfarnu samgonguna um útlendingaviðurskifti. Fundurin var við Høgna Hoydal, landsstýrismann í útlendingamálum og Bjarna Djurholm, landsstýrismann í vinnumálum.

Hetta var í heyst, tí longu tá hevði Føroya Arbeiðarafelag fingið nógvar fráboðanir um, at útlendingar vóru tiknir framum føroyingar á ymsum virkjum.

– Støðan var tann, at tá ið arbeiði var, vóru útlendingarnir til arbeiðis og føroyingarnir sótu heima, segði Ingeborg Vinther.

Men hon sigur, at einasta úrslitið av fundinum var, at landdsstýrið stutt eftir boðaði frá, at treytirnar skuldu linkast fyri at fáa útlendsk ítróttarfólk til Føroya.

Hon legði dent á, at Føroya Arbeiðarafelag hevði als onki ímóti útlendskum ítróttarfólkum, ella útlendingum annars.

– Men vit mugu ásanna, at arbeiðið er minkað heilt nógv í seinastuni og tað fer at minka enn meir, tí arbeiðsloysið í sambandi við alingina, er als ikki sligið ígjøgnum enn.

– Sostatt er støðan heilt álvarslig og sostatt er hetta ikki tíðin, at taka útlendingar til landið at arbeiða, heldur ikki, tá ið talan er um ítróttarfólk.

Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag segði, at sum støðan er, mugu tey ítróttarfeløg, sum taka ítróttarfólk til landið, eisini syrgja fyri at geva teimum so mikið í løn, at tey ikki skulu noyðast á arbeiðsmarknaðin at taka arbeiði frá føroyingum.

– Føroyingar skulu hava fyrsta rætt til tað arbeiði, sum er í landinum.

Ingeborg Vinther sigur, at fyrr, tá ið útlendingar komu til landið at arbeiða, vórðu fakfeløgini altíð spurd um nakað arbeiðsloysi var í hesum ávísa økinum, sum útendingum skuldi arbeiða í.

– Tann mannagongdin er broytt nú, so nú verða vit ikki eftirspurd.

Ingeborg Vinther legði kortini dent á, at Føroya Arbeiðarafelag fór ikki at sleppa málinum.



# Arbeiðsgevarar fáa knívin á barkan

**Føroya Arbeiðaraelag missir av og á tolið við arbeiðsgevarum, sum ikki vilja halda sáttmálarnar og teir hava fingið ta seinastu ávaringina**

ÓSEMJUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í seinastu hava onkrir arbeiðsgevarar fingið knívin á barkan frá Føroya Arbeiðarafelag.

Nú aðalfundur hevur verið hjá Føroya Arbeiðarafelag, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna, at í allarflestu førum halda arbeiðsgevarar sáttmálan uttan trupulleikar.

Men tað eru eisini heilt nógv dømi um, at ar-beiðsgevarar royna alskyns kynstur fyri at snúgva sær undan at betala sáttmálasettu lønirnar.

Og í ávísum førum er trupuleikin so stórur, at arbeiðsgevarar hava fingið knívin á barkan frá felagnum og hava fingið eina seinastu ávaring.

Tað merkir, at bróta teir sáttmálan einaferð afturat, verða teir boykottaðir uttan nakra sum helst ávaring.

Í tí eina førinum hevur Føroya Arbeiðarfelag hgavt trupuleikar av einum ávísum arbeiðsgevara í fleiri ár.

Fyrst vildi hann ikki so frægt sum gerast limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Hinvegin hevði hann eisini fyri ein part fólk í arbeiði, sum ikki vóru limir í fakfelag og sáttmálan helt hann als ikki

Tá setti Føroya Arbeiðarafelag hart ímóti hørðum, so hann noyddust at gerast limur í

Arbeiðsgevarafelganum, samstundis sum at arbeiðsfólkið varð skipað í fakfelag. Somuleiðis fekk hann boð um at halda sáttmálan.

Ingeborg Vinther sigur, at so var friður í eina tíð. Men tað vardi ikki leingi, so breyt hann aftur sáttmálan.

Hon sigur, at líka síðani hevur nógv stríð verið av hesum sama arbeiðsgevara. Hann brýtur sáttmálan javnan. Innímillum er so friður, men ongantíð leingi.

Nú er tað so enda við, at Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur fingið boð um, at hesin ávísi arbeiðsgevarin verður blokeraður allastaðni, verður ikki friður nú og heldur hann ikki sáttmálan hereftir.

Og tað verður uttan fráboðan, leggur Ingeborg Vinther afturat.

Hon sigur, at mark má vera, hvussu langt, Føroya Arbeiðarafelag kann toyggja seg.



*Tað er mark fyri, hvussu langt Føroya Arbeiðarafelag vil toyggja seg, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna. Mynd: Maria Olsen*

# Marius takkar fyri seg



*Marius Clementsen hevur nú takkað fyri seg í stjórnini í Føroya Arbeiðarafelag*



*Agnar Olsen úr Hòsvík er nýggjur maður í stjórnini í Føroya Arbeiðarafelag*

**Á aðalfundinum í Føroya Arbeiðaraf-elag leygardagin, tók Marius Clementsen av Sandi, seg úr stjórnini**

NEVNDARVAL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Marius Clementsen er ikki longur stjórnarlimur í Føroya Arbeiðarafelag.

Tað er greitt eftir aðalfundin í felagnum fríggjadagin og leygardagin.

Tá ið limir skuldi veljast í stjórnina, var Marius Clementsen av Sandi ein av teimum trimum stjórnarlimunum, sum stóu fyri vali.

Og tá boðaði hann frá, at hann tók ikki við afturvali.

Hann segði, at hann fylti 67 í næsta mánað og tí helt hann, at tíðin var komin at takka fyri seg og at lata onkran yngri koma framat.

Hann takkaði annars øllum í stjórnini í Føroya Arbeiðarafelag fyri gott samstarv.

Marius Clementsen hevur sitið í stjórnini í Føroya Arbeiðarafelag í átta ár.

Tey, sum hava sitið í stjórn saman við honum, takkaðu honum somuleiðis fyri gott samstarv.

Tey vóru samd um, at Marius hevði verið góður at havt í nevndini og ikki minst komu tey at sakna hansara heilt serliga sans fyri skemti.

Marius Clementsen hevur sitið í Stjórn Føroya Arbeiðarafelags í átta ár.

Hann skeyt sjálvur upp at velja Agnar Olsen í Hósvík í stjórnina í staðin fyri og tað tók aðalfundurin eisini undir við.

Onnur, sum stóðu fyri vali hesuferð, vóru Margretha Rasmussen úr Fuglafirði, Georg Hansen úr Miðvági og Sunrid Vang úr Froðba og tey vóru øll afturvald. Hini, sum sita í stjórnini eru Poul Juul Festirstein av Eiði, Karla Einarsson úr Rituvík og Ingeborg Vinther, forkvinna, úr Vági.